## Illir niðursetumenn

Nógvir ísraelsmenn, sum hava búsett seg í Gazageiranum, sýta fyri at flyta haðani, og teir seinastu dagarnar er spenningurin ímillum niðursetumenninar og myndugleikarnar vaksin nógv.

Mánadagin byrgdu illir niðursetumenn fleiri týðandi við býirnar Tel Aviv, Jerusalem og Haifa vegir av, og í fleiri støðum vóru beinleiðis samanbrestir ímillum niðursetumenn og løgregluna. Aðrastaðni steðgaði ferðslan, tí niðursetumenn høvdu tveitt seym og tunnur á vegirnar, og løgreglan noyddist at lýsa í útvarpinum, at fólk máttu taka vatn við sær í bilin í tí nógva hitanum, tí ferðslan gekk nógv seinni enn vanligt.

Ein felagsskapur, sum ungir niðursetumenn hava stovnað, hevur hótt við at leggja alt tað ísraelska samfelagið lamið fyri at mótmæla avgerðini hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra at flyta niðursetufólkini úr azageiranum. Fleiri ungfólk eru tikin og hava fingið fongsulsrevsing, men tað hevur víst seg, at tey halda fram við mótmælunum, so skjótt tey sleppa leys aftur, skrivar Reuters úr Jerusalem.

## Kvinnur royna sjálvmorð

Í árunum frá 2000 til 2002 royndu meiri enn 13.000 fólk í Noegi at taka meiri heilivág, enn læknarnir høvdu fyriskrivað. Nógv tey flestu gjørdu tað við tí fyri eyga at taka lívið av sær, og tølini vísa, at í flestu førum var talan um ungar kvinnur.

Gudrun Dieserud, sálarfrøðingur og granskari, sigur við blaðið hjá norska læknafelagnum, at tað eru serliga kvinnur í aldrinum 20 til 24 ár, sum royna at beina fyri sær við at taka meiri heilivág enn ásett, og at fimm av hvørjum túsund kvinnum doyggja av heilivágeitran. Tølini avdúka, at tað er sera ymiskt frá landsparti til landspart, hvussu nógvar kvinnur royna at beina fyri sær, men granskararnir duga ikki at siga, hví so er.

Aftenposten skrivar, at sjálvmorð er ein stórur trupulleiki í Noregi. Í 2003 tóku 502 fólk lívið av sær, 128 kvinnur og 374 menn. Sambært blaðnum hava sjálvmorðini ikki verið so mong í tali síðani 1976.

## Stjóraskifti í Boeing

Fyri trimum mánaðum síðani noyddist stjórin í amerikonsku flogverkssmiðjuni Boeing at leggja frá sær, tí tað kom fram, at hann hevði havt í so tætt samband við eina kvinnu, sum arbeiddi í fyritøkuni.

Síðani hevur leiðslan í felæagnum leitað eftir einum, ið kundi taka við eftir Hary Stonecipher, og fyrradagin bleiv so kunngjørt, at nýggi stjórin eitur James McNemey. Hann hevur verið stjóri í fyritøkuni 3M, sum hevur eitt sera breitt virkisøki. Men nýggi stjórin hevur eisini royndir innan flogídnaðin, tí eitt skifti var hann leiðari á teirri deildini hjá General Motors, sum ger motorar til flogfør.

Boeing er væl fyri, nú nýggi stjórnin tekur við. Felagið hevur fingið ikki færri enn 266 bíleggingar frá flogfeløgum, sum vilja hava flogfør av slagnum Boeing 787 Dreamliner, skrivar AP.

## Viðurskiftini avgerandi

Granskarar hava kannað, hví norðmenn stundum eru fyri limaskapi í ES, og hví teir stundum siga nei.

Kanningin vísir, at gongur tað væl í Noregi, eru norðmenn ímóti, at landið skal fara upp í ES. Gongur tað harafturímóti illa í Noregi, taka tey flestu undir við limaskapi í Evropasamveldinum. Tað er niðurstøðan hjá granskarunum, sum hava kannað tær ymsu meiningakanningarnar um ES-limaskap í árunum frá 1998 til 2003.

Eitt nú vísir kanningin hjá granskarunum, at veksur arbeiðsloysið í Noregi eitt prosentstig, økist undirtøkan fyri limaskapi í ES seks prosentstig. Harafturímóti vísir tað seg, at rentuhækkingar, hækkandi oljuprísur ella veksandi inflasjón hava sera lítla ávirkan á, hvat norðmenn halda um ES-limaskap.

UTTAN ÚR HEIMI

# Eingin hoyrir teirra neyðarróp

**Ein triðingur av fólkinum í vesturafrikanska landinum Niger hevur ov lítið til matna. ST hevur biðið onnur lond hjálpa teimum, men eingin lurtar.**

Neyð

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Miseydnað grøði og áhaldandi álop frá grashoppum hava gjørt, at umleið 3,5 milliónir fólk í vesturafrikanska landinum Niger svølta. Hjálparfelagsskapir siga, at 40 prosent av allari grøði er farin fyri skeyti, og teir vænta, at fleiri hundraðtúsund fólk fara at doyggja í hungri, fáa tey ikki hjálp sum skjótast.

-Tað er einki minni enn ein vanlukka, at altjóða samfelagið ikki ger nakað fyri at hjálpa hesum partinum av Afrika, sigur Jan Egeland, sum er varaðalskrivari í ST. .

-Fyri einum mánað síðani bað ST um 100 milliónir krónur til at hjálpa teimum svøltandi í Niger við, men enn hava vit bara fingið 20 milliónir, og tað er ein vónbrot, sigur Jan Egeland við Aftenposten.

### Børn doyggja

Viðurskiftini í Niger eru sera trupul, og landið er næstan altíð í neyð. Tað turra veðurlagið egnar seg sera illa til landbúnað. Tann einasta týðandi útflutningsvøran, sum landið hevur, er uran, men prísurin á urani er fallin tey seinastu árini. Á einum altjóða yvirliti yvir livikorini í heimsins londum er Niger nummar 173 og næstniðast. Bara í Sierra Leone eru livikorini verri enn í Niger.

Í næstu viku hittast leiðararnir í heimsins ríkastu londum á Gleneagleshotellinum í Skotlandi at umrøða ymsar spueningar, og ímillum evnini er fátækradømið í Afrika. Og har er nóg mikið at tosa um. Bara í Niger fáa 350.000 børn ov lítið at eta ella ov vánaligan mat, og í høvuðsstaðarumráðnum doyggja fleiri børn um dagin.

-Børn doyggja í hungri, men trupulleikin er, at eingin leggur nakað í tað, sigur Johanne Sekkenes, sum stendur á odda fyri arbeiðinum hjá felagsskapinum Læknar uttan Landamark í Niger.



*Hvønn dag doyggja børn í Niger í hungri, men eingin leggur nakað í tað, sigur felagsskapurin Læknar Uttan Landamark.*

*Mynd: Reuters*

# Bjargaði Buckingham Palace undan at verða bumbað

**Enski flogskiparin, sum rendi á eitt týskt flogfar, ið var á veg ímóti Buckingham Palace, er deyður.**

Hetja

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tann 15. september í 1940 varnaðist RAF-flogskiparin Ray Holmes, at eitt týskt bumbuflogfar av Dornierslagnum var á veg ímóti ensku kongsborgini Buckingham Palace. Hurricaneflogfarið hjá Holmes hevði einki lóður eftir, so hann fekk ikki skotið týska flogfarið niður. Ístaðin fyri valdi hann at renna á velið á týska flogfarinum, so tað datt niður. Harvið hevði hann bjargað kongsborgini.

Flogfarið hjá Ray Holmes fekk so stóran skaða av samanstoytinum, at tað datt eisini niður. Við 650 kilometra ferð nærkaðist tað jørðini, men tað eydnaðist Ray Holmes at leypa út í fallskíggja, og haðani sá hann flogfar sítt bresta niður í gøtuna Buckingham Palace Road.

Ray Holmes helt fram sum flogskipari hjá Royal Air Force, og tá kríggið endaði, fór hann at arbeiða sum tíðindamaður. Í fjør varð flogfar hansara grivið uppaftur úr Buckingham Palace Road í sambandi við ein film um dirvi hansara.

Tey seinastu árini hevur Ray Holmes verið sjúkur av krabbameini, og fyrradagin doyði hann. Hann var 90 ára gamal.